Heini O. Heinesen einki havt ímóti at verði landsstýrismaður

Hann er ikki nøgdur við at tjóðveldisflokkurin heldur ikki hesuferð hvørki fekk fiskivinnumál ella vinnumál at umsita í nýggju samgonguni

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
Áki Bertholdsen

Heini O. Heinesen dylir ikki fyri, at hann er misnøgdur við, at tjóðveldisflokkurin ikki fekk fiskivinnumál at umsita í samgonguna og at hann bleiv landsstýrismaður

– Hesuferð skuldi Tjóðveldisflokkurin fingið fiskivinnumál at umsitið í landsstýrinum.

Heini O. Heinesen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin í Norðoyggjum, er ikki nøgdir við, hvussu tey ymsu málsøkini eru býtt sundur ímillum teir fýra flokkarnar, sum skipaðu samgongu eftir løgtingsvalið 30. apríl.

Fyrr hevur Finnur Helmsdal givið ilt av sær í Sosialinum, at Tjóðveldisflokkurin ikki vístu honum ta álit, at seta hann í landsstýrið at umsita almannamál ístaðin fyri Páll á Reynatúgvu.

Men hann er ikki einsamallur um at vera misnøgdur, tí tað er aldurforsetin í flokinum og í Løgtinginum, Heini O. Heinesen eisini

– Eg haldi, at tað var skeivt, at tjóðveldisflokkurin ikki kravdi, ella ikki fekk fiskivinnumál at umsita, heldur Heini O. Heinesen.

Hann heldur lítið um, at tjóðveldisflokkurin sostatt hevur latið øll vinnumál upp í hendurnar á fólkaflokkinum.

Hann heldur eisini, at flokkurin hevur fólk, ið væl kundu umsitið fiskivinnumál, ella fiskivinnumál í Landsstýrinum.

Eitt nú hevði hann sjálvur ikki fýrt fyri at átikið sær ábyrgdina, fekk hann eina áheitan frá flokkinum.

Men tann áheitanin kom ongantíð og hann dylir ikki fyri, at tað er hann eitt sindur vónbrotin av.

Seinasti møguleikin???

Og hann heldur seg eisini hava nakað at hava vónbrotið í.

– Eg havi verið tingmaður fyri tjóðveldisflokkin í 18 ár og tað er meiri enn nakar annar av teimum, sum umboða flokkin.

– Tað er heldur ongin loyna, at stovnsrøkt og fiskiskapur yvirhøvur, hava havt mín heilt stóra áhuga í politikki.

Og umframt at vera tingmaður, hevur hann eisini drúgvar politiskar royndir úr ymsum nevndum, ikki minst á vinnuliga og fiskivinnupolitiska økinum

Hann hevur verið bygdaráðslimur í Kunoy frá 1962 til 1970 og bygdaráðsformaður síðan 1977, limur av starvsnevndini í Føroya Kommunufelag 1981-85 og formaður frá 1983 til 1985. Harumframt hevur hann verið nevndarlimur í Norðoya Tjóðveldisfelag 1978-81, formaður 1981-84, hann var í aðalstjórn tjóðveldisfloksins 1981-84 og harafturat limur í lokalnevndini 1990 - 1994.

Á tingi hevur hann verið formaður í ídnaðarnevndini frá 1985 til 1989 og frá 1993 til 1994. Hann var formaður í samferðslunevndini frá 1985 til 1986, formaður í fiskivinnuveldisflokkin á tingi síðan á ólavsøku 1994.

Tað ger ikki støðuna betri, at tey, sum vóru á gamla apoteki, tá ið samráðingarnar vóru um nýggja samgongu, fingu tað fatan, at fólkaflokkurin var til reiðar at lata tjóðveldisflokkin fáa fiskivinnumál og tað ljóðaði eisini í krókunum, at Heini O. Heinesen skuldi vera landsstýrismaður.

Nú Heini O. Heinesen ikki varð landsstyrismaður hesuferð, man tað vera meiri enn ivingarsamt, hvussu nógvar møguleikar, hann fær afturat, tí hann fyllir 64 ár í summar og ta við val verður aftur, man eisini hann nærkast eftirlønaraldrinum….

Ósunt

Vit spurdu síðani løgtingsmannin um tjóðveldisflokkurin eftir hansara tykki gjørdi nóg mikið fyri at fáa fiskivinnumál, ella vinnumál.

Tað dugir hann ikki at svara uppá, men hann heldur í øllum førum, at flokkurin læsti eg rættiliga fastan í, at hann aftur vildi hava figgjarmál at umsita í hesum valskeiðnum.

Og tað heldur hann vera eitt mistak.

– Eg haldi, at tað er »ósunt« hjá einum flokki at tvíhalda um somu málsøki ár eftir ár, tí tá kann bæði politikkur og flokkur stirðna og verða útbrend.

– Tvørturímóti haldi eg, at tað er gott fyri virkisfýsni, bæði innanhýsis í einum flokki og á málsøkinum sjálvum, at málsøki ganga upp á skift, hetta fyri at tryggja dynamikkin í tí førda politikkinum og fyri at tryggja, at tað verður ein ávís javnvág í tí førda politikkinum.

Hann nevnir sjálvstýrisflokkin sum eitt ræðandi dømi um hetta.

– Sjálvstýrisflokkurin legði seg á mentamál einaferð í tíðina og tað er hann aldrin sloppin burtur úr aftur. Fyrst gav tað honum eyknevni »finiflokkur« og var við til at eta hann upp innanífrá, so at hann fánaði burtur til onki var eftir av honum, sigur Heini O. Heinesen.

Hava sett seg inn í viðurskiftini

Onkur av málunum, sum nýggja Landsstýrismálanevndin nú hevur arvað, hava ligið í nevndini í fleiri ár

POLITIKKUR
Áki Bertholdsen

Landsstýrismálanevndin hevur havt sín fyrsta fund. Frá vinstru eru tey Kristina Samuelsen, skrivari, Kaj Leo Johannesen, næstformaður, Heini O. Heinesen, formaður og Jákup Mikkelsen, nevndarlimur

Hóast nývalda Løgtingið ikki fer til arbeiðis, fyrrenn á ólavsøku, eru tað tó summar av tingnevndunum, sum so smátt eru farnar til verka.

Ein av teimum er Landsstýrismálanevndin, sum hevði sín fyrsta veruliga fund í farnu viku.

Allir tríggir limirnir í Landsstýrismálanevndini hava ikki roynt tað fyrr at verið í nevndini og tveir av teimum eru harafturat púra feskir í landspolitikki yvirhøvur, tí bæði Kaj Leo Johannesen og Jákup Mikkelsen eru nývaldir í Løgtinginum.

Triði nevndarlimurin er Heini O. Heinesen, sum hinvegin hevur drúgvar royndir í politikki og hann er samstundis formaður.

Óavgreidd mál

Hann sigur, at á hesum fundinum fingu nevndarlimirnir ein a frágreiðing upp uppgávurnar hjá nevndini.

Harafturat fingu teir eina frágreiðing um tey mál, sum enn liggja í nevndini og sum tað ikki eydnaðist undanfarnu nevnd at avgreiða.

Eitt av teimum málunum er spurningurin um tunfiskaloyvini.

Heini O. Heinesen sigur, at hetta er eitt mál, sum hevur ligið í nevndini heilt síðani 1999, uttan at tað hevur eydnast at avgreiða tað.

Tað, sum Landsstýrismálanevndin skal avgreið í hesum føri er, um øll eru viðgjørt á jøvnum føti í sambandi við tunfiskaloyvini og um tað er loyvt at selja tey.

Eitt annað mál, sum eisini hevur verið drúgvt, er eitt mál um upphøggingarstuðul.

Eitt av skipunum, sum fekk upphøggingarstuðul, var trolarin Snoddið, sum varð seldur til Ísland. Men síðani hevur N. J. Mortensen á Tvøroyri keypt bátin aftur úr Íslandi og givið honum navnið Rasmus Effersøe.

Endamálið við upphøggingarstuðlinum var at avmarka veiðitrýstið. Og spurningurin, sum Landsstýrismálanevndin skal taka støðu til, er, um Landsstýrið hevði heimild at geva N.J. Mortensen loyvi at koma til lands við skipinum tí í lógini stendur beinleiðis, at skip, sum fáa upphøggingarstuðul, skulu ikki aftur í føroyska fiskiflotan.

Eftirlit og fyribyrgja

Annars sigur Heini O. Heinesen, at endamálið hjá landsstýrismálanevndini er at hava eftirlit við landsstýrisfólkunum, so at tey umsita síni málsøki á rættan hátt.

– Men endamálið er eisini at fyribyrgja og at forða fyri, at landsstýrisfólk koma illa fyri og tað haldi eg bert kann vera ein fyrimunur hjá landsstýrisfólkunum.

Hann hevur fyrr sagt, at hann hevur varhugan av, at tiltøk eru á veg á fiskivinnuøkinum sum hann ikki heldur eru í samsvari við lógina og at hann fer at hava eitt vakið eyga við umsitingini hjá Jørgin Niclasen, fiskimálaráðharra.

Heini O. Heinesen sigur at tað skal sjálvandi ikki skiljast so, at Landsstýrismálanevndin fer at ansa betri eftir Jørgin Niclasen, enn eftir hinum landsstýrisfólkunum.

Men hann leggur kortini afturat, at hann hevur frætt at ætlanir eru frammi á fiskivinnuøkinum, sum ikki eru í samsvari við lógina og at hann fer at fylgja við, hvussu tær verða avgreiddar í Fiskimálaráðnum

Tað, hann sipar til, er, at hann hevur frætt, at menn eru í ferð við at keypa útróðrarbátar og at leggja fiskiloyvini yvir til línuskip ístaðin.

Bøtt manningarviðurskifti umborð á Klakki

- Hetta er ein nútímansgerð av allari apeteringini umborð, sigur Tormund Johannesen, verkfrøðingur á Tórshavnar Skipasmiðju.

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Eitt sindur løgin sær hann út, nú skipssíðan er skorin nakað niður í støðum. Tá ið Klakkur verður liðugur á Tórshavnar Skipasmiðju til heystar, verða manningarrúmini ikki til at kenna aftur.

Fyri trimum árum síðan fekk línuskipið, Klakkur úr Klaksvík, nýggja brúgv, messu og gallu. Hetta var ein liður í at gera umstøðurnar umborð á skipinum betri hjá manningini, so trivnaðurin verður størri.

Nú verður so restin av tí arbeiði gjørt, sum ikki varð gjørt ta ferðina.

Betri manningarrúm

Klakkur stendur á Tórshavnar Skipasmiðju, og har kemur hann helst at standa einar 8 vikur, meðan arbeiðið verður gjørt.

Eitt sindur løgin sær línubáturin út, nú plátur eru skornar niður av bakkanum.

Tormund Johannesen, verkfrøðingur á skipasmiðjuni, sigur, at tað, sum nú verður gjørt við skipið, er apeteringin frammi undir bakkanum og afturí í kahyttuni, har manningin heldur til.

- Klakkur hevði hvalabak, sum teir gomlu línubátarnir høvdu, har bakkin er rundaður. Nú verður rundingurin skorin burtur, og skipssíðan ført beint upp, eins og bakkin fær skansaklædning, sigur verkfrøðingurin.

Skifta plátur

Tormund vísir á, at gronin á skipinum kanska sær eitt sindur løgin út nú, tí skipssíðan er skorin nokso nógv niður í støðum.

- Skipssíðan var nakað buglað, og hesar plátturnar verða nú eisini skiftar, eins og akkerini, sum Klakkur hevði í bógnum, verða flutt upp á bakkan, so plássið undir bakkanum verður uppaftur betri.

Tormund Johannesen sigur, at arbeiði, sum Tórshavnar Skipasmiðja er í holt við umborð á Klakki, er ein nútímansgerð av allari apeteringini umborð.

Meðan Klakkur er á beding, verður skipið eisini málið og pussað upp annars.

So vóru trolararnir fullastaðir aftur

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Eftir at fiskiskapurin hjá trolarunum hevur verið heldur slakur í seinastuni, er nú líkt til, at meira hevur verið at fingið aftur seinastu dagarnar.

Fríggjadagin landaðu partrolararnir, Ametyst og Jaspis. Teir vóru fullir og høvdu eini 240.000 pund tilsamans.

Fiskavirking í Saltangará keypti upsan hjá Ametyst, sum vá 104.000 pund. Teir høvdu eisini nakað av øðrum fiski, sum onnur virki keyptu.

Jaspis hevði nakað tað sama sum Ametyst; teir landaðu hjá P/F Beta, og har keypti Fiskavirking í Vestmanna upsan.

Á Fiskavirking í Saltangará sigur Jason Johannesen, at nóg mikið er av fiski til á middegi í gjár.

- Vit vita ikki beint nú, hvør næsti bátur verður, men tað kann vera so skjótt, at meira fiskur kemur inn á gólvið, so fiskaarbeiði eisini verður samanhangandi hesa vikuna, sigur hann.

Mánadagin landaði Fiskavirking í Saltangará trolbátin, Karin. Teir høvdu góð 20.000 pund av toski, flatfiski og øðrum fiskasløgum. Sum skilst, verður fiskurin hjá Karini, sum trolar á landleiðini, sendur av landinum.



Eftir at fiskiskapurin hjá trolarunum hevur verið heldur slakur í seinastuni, er nú líkt til, at meiri upsi er at fáa aftur

Nón skipar fyri almennum sjavskappingum í Hæddini

TILTØK
Vilmund Jacobsen

Í summar skipar Eldrafelagið Nón fyri almennum sjavskappingum í hølunum hjá arbeiðarafelagnum, Hæddini í Saltangará.

Tvær slíkar kappingar hava verið, og Amy Djurhuus, formaður í Nón, sigur, at undirtøkan hevur verið hampiliga góð, tá ið havt verður í huga, at hetta er eitt nýtt tiltak hjá felagnum.

- Ivaleyst halda mong, at hetta eru kappingar, sum bara eru fyri limirnar í Nón, men so er ikki. Øll eru vælkomin at verða við, bæði kvinnur og menn, ung sum gomul.

Sjavskappingarnar verða hvønn leygardag og byrjað verður klokkan 18. Vinnararnir fáa steyp ella okkurt annað gott sum virðisløn – hvørt leygarkvøld.

- Tað eru nógv, sum eiga ein hóp av steypum og kanska heldur vilja vinna eitt glas, sigur hon.

Amy sigur, at NSÍ vanliga skipar fyri sjavskappingum, men hesin aktivitetur hjá ítróttarfelagnum liggur stillur um summarið.

- Tí hava vit valt at taka henda táttin upp í summarmánaðunum.

Hon sigur, at Nón soleiðis fer at skipa fyri sjavskappingum í Hæddini hvørt leygarkvøld fram til endan av august mánaði.

15 ár til heystar

Eldrafelagið Nón hevur annars 15 ár á baki til heystar.

- Upprunaliga heitið hjá felagnum var »Pensjónistafelagið«, men vit valdu fyri nøkrum fáum árum síðan at »umdoypa« felagið til »Eldrafelagið Nón«, sigur Amy.

Hon vísir á, at tað var arbeiðarafelagið Hæddin, sum tók stig til at stovna felagið og hevur øll árini lagt hølir til tey tiltøk, sum felagið hevur.

- Vit plaga at skipa fyri fyrilestrum og øðrum gjøgnum veturin, og vit hava tveir regluligar fundir um mánaðin. Somuleiðis hava vit altíð eina jólaveitslu og eina veitslu, tá ið árið endar móti sumri.

Regluliga virksemið hjá Nón, sum er fyri limirnar í felagnum, heldur uppat, tá ið summarið nærkast.

- Men vit hildu, at vit skuldu gera okkurt til nyttu um summarið eisini, og tí valdu vit at skipa fyri almennum sjavskappingum, sum øll kunnu luttaka í, sigur Amy Djurhuus og vísir á, at tey, sum koma til hesar kappingar, kunnu keypa sær kaffi, vaflur og smurt breyð hesi leygarkvøldini. Somuleiðis hevur felagið burturluting.

Sjey nevndarlimir umframt tveir tiltakslimir eru í Eldrafelagnum Nón.